FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

28. november 2025
Mál: 25/30965-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-050/2025

Svar frá Jóhan Christiansen, landsstýrismanni, upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-050/2025 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um ákærur ímóti sýslumanni og grindaformonnum í sambandi við, at grind er hildin til.

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Er tað rætt, at ákærur eru reistar ímóti sýslumanni og grindaformonnum í sambandi við kærur frá útlendskum felagsskapum, sum vilja steðga grindadrápi?
2. Um so er, hvussu er hetta gjørt og við hvørjari grundgeving?
3. Um so er, við hvørjari heimild og á hvørjum lógargrundarlagi er hetta gjørt?
4. Kann landsstýrismaðurin vátta, at alt, sum snýr seg um grundleggjandi rættin til grindadráp og aðra veiðu av villini djórum í okkara egna náttúrutilfeingi, er skipað í serstakari føroyskari lóg og reglum, sum ikki kann setast til viks av aðrari lóg?
5. Hvat hevur landsstýrismaðurin gjørt og hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera til tess at tryggja, at útlendskir felagsskapir ikki umvegis ákæruvaldið og løgregluna í Føroyum gera seg inn á grindalógina, sýslumenn, grindaformenn og grindamenn og rættin at drepa grind í Føroyum?

Svar:

Til spurning 1-3:
Landsstýrismanninum kunnugt eru sýslumaður og grindaformenn skuldsettir fyri brot á § 3 og § 13 í løgtingslóg um djóravælferð í sambandi við grindadráp í Hvannasundi. Tað ljóðar, at útlendskur felagsskapur hevur boðað frá, men eg kenni ikki grundgevingarnar fyri, at málið er fráboðað.

Til spurning nr. 4:
Grindadráp er aldargamal siður, sum er neyvt skipaður í løgtingslóg og kunngerð um grind og annan smáhval. Talan er um eina serlóg, og sambært almennari løgfrøðiligari

fatan gongur slík lóg vanliga fram um generella lóggávu. Í hesum føri er løgtingslóg um djóravælferð at meta sum generell lóggáva. Bæði grindalógin og djóravælferðarlógini kunnu kortini, eins og øll onnur lóggáva, verða settar til viks av aðrari lóggávu, um Løgtingið samtykkir tað, ella um rætturin kemur til ta niðurstøðuna.

Løgtingslóg um djóravælferð er partur av málsøkinum hjá landsstýriskvinnuni í uttanríkis- og vinnumálum, og víst verður tí eisini til svar hennara upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-054/2025 um reist mál ímóti sýslumanni og grindaformonnum í sambandi við, at grind er hildin til.

Til spurning 5:
Rætturin at drepa grind, eins og virksemi og uppgávur hjá sýslumonnum, grindaformonnum og grindamonnum, er reguleraður í og vardur av løgtingslóg og kunngerð um grind og annan smáhval.

Uttan mun til, um málið snýr seg um brot á grindalóggávuna ella løgtingslóg um djóravælferð, vildi eg hildið, at politiið og ákæruvaldið fara at meta um málið og viga lóggávuna upp móti hvørji fyri at gera av, um ákæra skal reisast.

Ger ákæruvaldið av at fara víðari við málinum fæst greiða á, hvat rætturin metir vera galdandi. Talan er – mær kunnugt – um fyrsta mál av hesum slagi, og hetta er mál, sum hevur avgerandi týdning fyri rætt okkara at gagnnýta okkara náttúrugivna tilfeingi.

Skuldi rætturin komið til ta niðurstøðu, at løgtingslóg um djóravælferð gongur fram um grindalóggávuna, eigur at verða umhugsað at broyta løgtingslóg um djóravælferð soleiðis, at tað verður greitt ásett, at hon ikki er galdandi fyri grindadráp.

At enda skal leggjast afturat, at tað stendur einum og hvørjum frítt at boða politinum frá brotum, sum viðkomandi metir seg kenna til. Hetta er grundleggjandi rættur í einum rættarsamfelag, og tað ber ikki til at avmarka henda rætt við teirri grundgeving, at talan er um serføroysk viðurskifti og serføroyska lóggávu.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, 28. november 2025

Jóhan Christiansen
landsstýrismaður